# Eingir uttanflokkalistar



*Zakarias Wang er higartil tann seinasti í røðini av einstaklingum uttanflokka, sum hava stillað upp til fólkatingsvalið. Hann stillar ikki upp einsamallur hesa ferð. Lógin heimilar ikki listasamgongum ella flokkum uttanfyri løgtingið at stilla upp.*

**Hóast allir flokkar ikki enn hava tikið støðu til, um teir stilla upp til fólkatingsvalið 20. november, so skyldast hetta ikki, at uttanflokkalistar ella aðrar politiskir flokkar, enn teir á tingi, fara at stilla upp. Lógin heimilar bert flokkum á tingi og einstaklingum uttanflokka at stilla upp**

FÓLKATINGSVAL
*Heri á Rógvi*

Fólkatingsval er sett at vera 20. november í hesum árinum. Hetta merkir, at politisku flokkarnir fáa skund við at skipa fyri sínum valstríði, og summir skulu eisini líka avgera, um teir yvirhøvur stilla upp, hóast ábendingar eru um, at allir flokkar á tingi fara at stilla upp til fólkatingsvalið.

Men nú er tað heldur ikki soleiðis, at aðrir flokkar enn teir á tingi skulu gerast sær stórvegis tankar um at stilla upp. Tað er eisini lítið sannlíkt, at ein politiskur flokkur uttanfyri løgtingið klárar at fáa síni viðurskifti í rættlag, soleiðis at klárt hevði verið at stilla upp til fólkatingsvalið um stívliga tríggjar vikur.

Tað er ríkislóg nr. 458 um fólkatingsval í Føroyum, sum ásetur hvussu skal farast fram í sambandi við fólkatingsval í Føroyum.

Lógin tilskilar, at tað eru flokkar umboðaðir á Føroya Løgtingið, sum kunnu stilla upp til valið. Eisini kunnu einstaklingar stilla upp uttanflokka, men tað ber ikki til hjá hesum at stilla upp saman á einum lista, um teir skuldu ynskt tað.

Hetta merkir, at eitt nú Verkamannafylgingin, sum við næstseinasta fólkatingsval mundi gjørt eitt rættiligt tak við Øssuri Winthereig á odda, ikki hevði kunnað gjørt tað sama hesa ferð.

Søgan sigur okkum, at fleiri einstaklingar hava stillað upp uttanflokka, og onkur av hesum hevur eisini stillað upp á listasamgongu við politiskan flokk, og hetta hevur eisini verið avgerðandi onkuntíð. Hetta ber tó heldur ikki til á hesum komandi fólkatingsvalinum, sambært galdandi lóg. Hetta merkir, at tað ikki hevði verið, um teir skuldu ynskt tað soleiðis, hjá eitt nú Javnaðar- og Sambandsflokkinum og Fólka- og Tjóðveldisflokkinum, at sligið seg saman á ein lista. Í øllum førum ikki uttan so, at fólkafloksmenn eitt nú hoppaðu yvir á tjóðveldislistan, og sambandsmenn 20. november gjørdust javnaðarmenn.

Tað er heldur ikki nakað mark fyri, hvussu nógv valevni skulu vera á hvørjum flokslista sær, ella hvussu nógvir einstaklingar kunnu stilla upp uttanflokka. Eitt uttanflokka valevni skal hava millum 150 og 200 stillarar aftanfyri seg.

# Fólkaflokkurin landsfund leygardagin

*Fólkafloksmenn og kvinnur eru í dag í Klaksvík á landsfundi. Formaðurin í flokkinum væntar ein róligan fund.*



**Eisini fólkafloksmenn fara til Klaksvíkar leygardagin á landsfund. Umframt vanligu skránna, verður eisini Bent Jensen, sum skal kanna skjalagoymslurnar eystanfyri fyri føroyingar, við sum gestarøðari. Somuleiðis verður komandi fólkatingsval eisini á skránni**

LANDSFUNDUR
*Heri á Rógvi*

Áhugin at halda fundir í Klaksvík er rættiliga stórur fyri tíðina. Sjálvstýrisflokkurin hevur kunngjørt, at hann ætlar at halda landsfund í Klaksvík leygardagin. Einki formansval verður eftir øllum at døma á skránni hjá teimum.

Fólkaflokkurin hevur sett teirra landsfund á skránna leygardagin, og hann verður eisini í Klaksvík. Tað er einki yvir at dylja, at Fólkaflokkurin leingi hevur verið og er sera sterkur í Norðoyggjum, og harvið Klaksvík. Í løtuni hevur flokkurin tveir løgtingsmenn úr Klaksvík, Rúnu Sivertsen, varamaður fyri Anfinn Kallsberg, og Jógvan við Keldu.

Landsfundurin er settur at byrja leygardagin kl. 10 í Tekniska Skúla í Klaksvík. Á skránni er, sambært heimasíðuni hjá flokkinum, At starvsnevndi greiðir frá virkseminum hjá felagnum farna árið og eisini kemur formaðurin við einari politiskari frásøgn. Eftir hvat skilst, so plaga landsstýris- og løgtingsmenn floksins eisini at taka til orðanna á landsfundinum.

Gestarøðin á fundinum verður Bent Jensen. Hann gjørdist kendur í Føroyum, tá ið hann varð tilnevndur at kanna skjalagoymslur fyri føroyingar eystanfyri, t.e. einamest gamla Sovjetsamveldið. Hann er til dagligt professari, og hevur drúgvar royndir innan kanningar av tílíkum slagi. Hann hevur eisini skrivað eina bók um Bornholm undir Kalda krígnum, sum kallast Bjørnen og Haren. Tað var eisini eitt sindur av rokið, tá ið hann varð tilnevndur, og síðani hevur ikki nógv verið at hoyrt frá honum. Tað verður í øllum førum spennandi at hoyra, hvat hann hevur at siga.

Óli Breckman, formaður fyri Fólkaflokkin, sigur, at landsfundirnir hjá Fólkaflokkinum ikki eru millum teir mest dramatisku. Tað verður mest orienterað á fundinum, og einasti dramatikkurin verður møguliga gjøgnum kjaki. Einki kampval stendur á skránni leygardagin. Formaðurin sigur, at eru somikið jarðbundin, at alt gongur fyri seg hovliga í besta forstáilsi. Heldur einki valupplegg sum Fólkið fyrst verður lagt fram á fundinum, ikki meira enn at tosað verður um, hvussu flokkurin skal gera í sambandi við komandi valini, greiðir Óli Breckman frá.

Um kvøldið, eftir fundin, verður døgurði. Landsfundurin er fyri øll fólkafloksáhugaði, verður upplýst av skrivstovuni hjá flokkinum.







# NÝGGJ FLØGA

*við Britney Spears*

**Kr. 169,-**

- kemur út 5. november

